

## Tey flestu vilja hava Jóhonnu

Flestu íslendingar, sum hava áhuga fyri politiskum viðurskiftum, halda, at Jóhanna Sigurðardóttir skal stilla upp til formansvalið í Samfylkingini. Ein kanning hjá Fréttablaðnum vísir, at 55,3 prosent av teimum spurdu vilja hava Jóhonnu at stilla upp, og 26,3 prosent halda, at Dagur B. Eggertsson eigur at taka við sum formaður, nú Ingibjørg Sólrún Gísladóttir fer frá. Onnur, sum hava verið nevnd sum møguligur formaður, fáa nógv minni undirtøku. Av veljarunum hjá Samfylkingini vilja 56 prosent hava Jóhonnu Sigurðardóttir til formann, og 33,6 prosent vilja hava Dag B. Eggertsson, skrivar Vísir.

## Vit verða 9 mia. í 2050

Í løtuni búgva 6,8 milliardir fólk á jørðini, og tíðliga í 2012 verða vit fleiri enn sjey milliardir. Tað sigur ST í einari nýggjari frágreiðing, sum samstundis staðfestir, at við verandi gongd fer fólkatalið í heiminum upp um níggju milliardir í 2050. Í dag búgva 5,6 milliardir fólk í menningarlondunum, og hetta talið verður 7,9 milliardir í 2050, tí fólkatalið í menningarlondunum veksur tvær ferðir skjótari enn í teimum framkomnu londunum. USA er tað landið, sum flest fólk flyta til og búseta seg í, meðan grannalandið Meksiko er tað landið, sum flest fólk flyta úr - og í flestu førum júst til USA.

# Hugsa um umhvørvið

**Um góðar tveir mánaðir skal nýggja kloakkskipanin í Nólsoy vera liðug. Tá verður alt spillvatn leitt út á streymasjógv**



*Tað hevur víst seg neyðugt við nógv meiri brekking enn framman undan roknað við*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

UMHVØRVI
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tórshavnar kommuna hevur seinastu árini arbeitt miðvíst við at leiða allar kloakkir út á streymasjógv. Stórur partur av sjálvari Havnini hevur fingið nýggja kloakkskipan, og fyri tveimum árum síðani fekk Hestur eisini nýggjar kloakkir.

Seinast er túrurin so komin til Nólsoyar, og síðani juni mánaði í fjør hevur verið arbeitt við at leggja nýggja kloakkskipan í bygdini.

Arbeiðið er rættiliga umfatandi og krevjandi, tí tað er ikki allastaðni, at spillvatnið náttúrliga rennur á sjógv.

- Tað hevur verið neyðugt at seta upp tríggjar pumpubrunnar, fyri at pumpa vatnið víðari í skipanini, sigur Frank Hellisdal, sum er arbeiðstakari.

Tað hevur eisini víst seg at vera truplari at leggja nýggju skipanina, tí neyðugt hevur verið at brekka veitirnar í nógv størri mun, enn framman undan væntað.

- Hetta hevur seinkað arbeiðinum nakað og hevur merkt, at vit hava verið noyddir at arbeiða longri dagar fyri at halda tíðarætlanina, sigur Frank Hellisdal.

Landsstýrið boðaði fyri nøkrum árum síðani frá, at ein kunngerð var á veg um, at eingin kloakk frá ár 2010 skuldi leiðast út í vágir og havnir. Og hóast henda kunngerðin ikki er sett í gildi enn, og hóast tíðarfreistin sambært landsstýriskvinnuni verður útsett, hevur Tórshavnar kommuna arbeitt sum um kunngerðin longu hevði fingið gildi.

Og júst fyri at nýggja kloakkskipanin skal kunna leiðast út á streymasjógv, er neyðugt við hesum pumpubrunnunum.

- Kloakkin verður leidd norður um kirkjuna og út á sjógv norðanfyri grótkastið, sum er lagt út frá Kirkjutanganum, sigur Frank Hellisdal.

Hann sigur, at hóast nólsoyarbygd kann tykjast lítil, so er tað kortini langt um at fara við einari kloakkskipan.

- Eg dugi ikki at siga, hvussu long kloakkskipanin er, men tað snýr seg um kilometrar av rørum, sum eru og skulu leggjast niður, sigur Frank Hellisdal.

Nýggja kloakkskipanin skal bert taka ímóti spillvatninum, meðan regnvatnið framvegis skal renna í verandi skipan.

Tað er Maskingrevstur við Frank Hellisdal, sum ger arbeiðið, meðan B.P Consult hevur teknað og hevur eftirlit við arbeiðinum.

Fýra og fimm mans hava arbeitt við nýggju kloakkskipanini, sum skal verða liðug um mánaðarskiftið mai/juni í ár.

# Fara at royna við snelluni

**Vánaliga fiskaríið við línuni hava fingið fleiri av útróðrarbátnum at leggja um til snellu, og tað hevur ligið hampiliga væl fyri higartil**

ÚTRÓÐUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fiskaríið hjá útróðrarbátunum higartil í ár hevur slett ikki verið so galið. Nøgdirnar hava verið væl størri, sum eru komnar upp á land, men hinvegin hevur prísurin verið »bedrøviligur«, sum onkur sigur.

Ein av teimum, sum í mong ár hevur róð út, er Rúni Poulsen, sum saman við bróðurinum Bárði eigur 38 fót AWI-bátin Tóra.

Teir báðir hava verið úti tær løturnar, tað hevur viðrað, men hóast fiskiskapurin hevur verið á einari heilt góðari leið, so er ikki nær til komið tað burtur úr, sum tað átti.

- Prísurin er í botni. Vit fáa helvtina minni í meðal fyri fiskin nú í mun til fyri einum ári síðani, sigur Rúni Poulsen.

Teir plagdu fyri nøkrum árum síðani at leggja um til snellu og vera á Norðhavinum ta vertíðina, men tað hava teir iki gjørt seinastu árini. Teir hava róð út við línu alt árið. Men nú hava teir so valt at leggja um til snellu.

- Tað vísir seg, sum fiskurin bara stendur inni á teimum økjum, sum eru stongd fyri línuveiði, og í teimum kassunum hava bátar havt hampiligan fiskiskap við snelluni. So nú fara vit so at royna tað, sigur Rúni Poulsen.

Tóra er »yvirdekkað« við einari plastpresending í bakborð, og fyri at sleppa undan at taka hana niður, hava teir bápir fingist við at flyta hydraulikkin úr bakborði yvir í stýriborð. Presendingn lívir so væl, at tað í ríkiligan mun vigar upp móti teimum smátrupulleikum, ið standast av at hava snellurnar í stýriborð.

### Nógv stongt

- Veðurvánirnar eru so skiftandi, men tað verður so helst eftir ættini vit fara. Antin tað verður vesturum ella á Norðhavið, sigur Rúni Poulsen.

Bæði á Vesturhavinum og á Norðhavinum er mestsum alt stongt fyri línu allan mars mánað, men tað ber sum nevnt til at fiska við línu, og sum skilst er fiskiskapurin hampiligur.

- Tað eru nakrir bátar, sum royna við snellu. Við línuni er tað soleiðis fyri tíðina, at tú mást fáa minst 100 pund upp á stampin fyri tað skal loysa seg. Tað er so mikið dýrt at rógva við línu, at við teimum prísum, sum nú eru, lønir tað seg slett ikki, um ikki fiskiskapurin er um tey 100 pundini, sigur Rúni Poulsen.

Tað eru eisini so ógvuliga stór økir, sum eru stongd í mars mánaði, bæði á Norðhavinum og í Vesturhavinum.

- Eysturi í Holinum er næstan einasta staðið, tú kanst fiska við línu í løtuni, men tað er so ógvuliga langt at sigla. Nú hava vit so rigga til við snelluni, so eg rokni við at vit fara onkunstaðni í kvøld. Antin tað so verður norðureftir ella vestureftir fáa vit bara at síggja. Í morgin sigur hann gott veður, so tá kann farast allastaðni, sigur Rúni Poulsen.

Tað eru fleiri ár síðani hann og bróðurin hava roynt við snellu, men nú skal tað so roynast aftur.



*Rúni Poulsen – og bróðurin Bárður – hava lagt um til snellu, og fara nú antin á Norðhavið ella í Vesaturhavið at royna, inntil stongdu kassarnir lata upp aftur*
*Mynd: Álvur Haraldsen*